


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 08 - 2012

# Óvissa trýstir oljuprísin upp

Oljuprísurin er hækkaður á altjóða marknaðinum i Asia í morgun. Orsøkin er ábendingar um, at tiltøk verða framd fyri at økja búskaparvøksturin í USA, Kina og í Evropa. Ein onnur orsøk er hendingin í gjár, tá eitt amerikanskt herskip og eitt oljutangaskip stoyttu saman í Hormuz-sundinum. Tað skrivar franska tíðindastovan AFP. Í New York er prísurin á ráolju, sum skal latast í september, hækkaður umleið 48 cent upp í 93,35 dollarar fyri tunnuna, og í London er prísurin á einari tunnun av Brent-olju hækkaður 78 cent og er nú 113,73 dollarar.